# hjartanum í Havn

*”Okkara ætlan vendir sær til ein einstakan aldursbólk, nevniliga tey sum eru omanfyri 55 ár. Hesi fólkini hava lítlan hug at búseta seg uppi í t.d. Hoyvíkshaganum ella aðrastaðni langt burtur frá miðbýnum*



*Henda býarmyndin fer at hvørva, men upp kemur ein onnur býarmynd, sum skal verða vakrasti bygningurin í Havn. - Sjálvt økið kann tí gerast eitt satt paradís fyri tilkomnar havnarborgarar. Nú sleppa tey framvegis at búgva í kendum umhvørvi, sigur Rói Egholm, stjóri í Farex*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Treytir fyri einum hugnaheimi

Nýggja hugnaheimið í hjartanum á høvuðsstaðnum skuldi lúka fylgjandi treytir frá KRK-Holding.

- Hann var ætlaður tí eldra ættarliðnum (55+)
- Bygningurin skal hava eitt snið sum hóskar inn í verandi umhvørvi og skal somuleiðis vera nýskapandi
- Vesturskinið skal koma øllum íbúðunum til góðar
- Svalin skal hava eina slíka støðd, at íbúgvararnir kunnu hava ein lítlan køksurtagarð uttanfyri
- Bygningurin skal vera vinarligur fyri rørslutarnað
- Havnarmyndin skal so vítt gjørligt varðveitast.

Haraftrat hava íbúðirnar eitt sera vakurt útsýni yvir Havnina, hóast tær liggja beint við miðbýin. Tann vakri urtagarðurin verður varðveittur til sín uppruna frá 60’árunum. Innkoyringin verður úr Gripsvegi og ikki sum nú frá R.C.Effersøesgøtu við síni nógvu ferðslu.

Í dag er veruleikin hann, at nógv eldri fólk búgva í egnum húsum, sum so líðandi eru vorðin alt ov stór til tey. Tey ynskja sær eina aðra loysn, men spurningur teirra hevur verið, hvat alternativið var.

Tað er júst hetta sum liggur fremst í huganum hjá monnunum handan KRK-Holding: At hesi eldri fólkini skulu kunnu búseta seg í eini íbúð í hóskandi støðd til teirra tørv og í vakrasta umhvørvinum í høvuðsstaðnum.

### Stuttur vegur

Rói Egholm leggur stóran dent á, at ætlan teirra er ikki á nakran hátt at kappast við tær verandi ætlanirnar um íbúðarbygging, sum í løtuni eru í gerð í Havn.

– Okkara ætlan vendir sær til ein einstakan aldursbólk, nevniliga tey sum eru omanfyri 55 ár. Hesi fólkini hava lítlan hug at búseta seg uppi í t.d. Hoyvíkshaganum ella aðrastaðni langt burtur frá miðbýnum, sigur hann.

Við hesi loysnini kunnu fólk í hesum aldri, nú selja hús síni og síðani brúka frívirðið frá søluni til at gera eina íløgu í eina av hesum 30 íbúðunum.

– Tann størsti fyrimunurin er somuleiðis hann, at tey bert eru fáar hundrað metrar frá Vágsbotni, Tilhaldinum, SMS ella frá miðbýnum í Havn.

– Sjálvt økið kann tí gerast eitt satt paradís fyri tilkomnar havnarborgarar. Nú sleppa tey framvegis at búgva í kendum umhvørvi, sigur Rói.




*Úr íbúðunum verður frálíkt útsýni yvir Havnina, umframt tað at ein fær gleði av vesturskininum, hóast ein er staddur mitt í hjartanum í Havn*